Býráðsfundurin tann 6. februar 2007

Ár 2007, hin 6. februar kl. 18.00 hevði Klaksvíkar Býráð fund við niðanfyri standandi fundarskrá.

Allir limir á fundi.

1.
2007-15-002 Umsókn um frábýti av lendi matr. 965a.
Søkt verður um frábýti av uml. 500m2 av matr. nr. 965a í Ánunum. Talan er um grundøki til verandi sethús, sum ikki ætlast innganga í aktuellu byggiætlanini í økinum. T.U. mælir til, at umsóknin verður gingin á møti, samstundis sum umsøkj-arin verður mintur á, at víddin av byggiøkinum við hesum verður tilsvarandi minni, havandi í huga galdandi byggistig.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt

2.
2006-03-087 Alternativ bygging á Norðoyri.
Kommunan bjóðaði eitt øki úti á Norðoyri út til alternativa bygging. Tikið varð av boði frá einum byggifelag. Víst verður til býráðssamtykt 17.06.06, sum liggur í málinum, har mælt varð til at taka upp samráðingar við byggifelagið við treytum um at fáa fíggjarviðurskiftini og tíðarætlan uppá pláss og somuleiðis greiðari tekningar. Omanfyri nevndu viðurskifti eru tó ongantíð komin uppá pláss. Byggifelagið setur fram ynski í skrivi, dagf. 06.12.06 um at bíða við keypinum av lendinum til hesa ætlan, tá teir ætla at seta eina marknaðarkanning í gongd og verður henda kanning ikki greið fyrr enn í summar. Tá nú eftirspurningurin eftir grundstykkjum er so stórur, verður mælt til:

1. At bjóða økið út av nýggjum beinanvegin

2. At T.U. ger eina nýggja ætlan um útstykking yvir økið

Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum Pkt. 2.

Tekniska nevnd viðgjørdi skrivi um útseting av byggingini á Norðoyri. Nevndin tekur undir við skrivi frá T.U., dagf. 11.01.07 og T.U. ger eitt nýtt tilmæli um útstykking til komandi fund.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

3.
2006-19-038 Íverksetanardepil í Klaksvík.
Vísandi til viðgerðir í Fíggjarnevndin verður lagt til støðutakan uppskot til skipan av íverksetarahúsinum og skipa av nýtsluni av ogn býráðsins á Jústabrekka 1. Sí skriv frá umsitingini.

Rani Nolsøe, menningarstjóri møtti á fundinum í Fíggjarnevndini í smb. við hetta málið og greiddi frá málinum.

Nevndin umrøddi tilmælið/notatið frá umsitingini og hevði hesar viðmerkingar:

Viðv. val av nevnd: Kommunan skal framhaldandi manna nevndina, harav tann eini limurin verður valdur eftir innstilling frá Eik Banka.

Viðv. vinnuligari luttøku: Nevndin metir ikki, at grunnurin skal luttaka beinleiðis fíggjarliga í vinnuvirksemi, og vil tí hava grein 2 nærri lýst, hvør týdningurin av seinna parti er.

Viðv. húsinum: Gjørdur verður ein leigusáttmáli við grunnin íverksetarahúsið, vísandi til endamálið. Við omanfyri nevndu viðmerkingum mælir nevndin til, at umsitingin fær heimild til at arbeiða víðari við málinum eftir tí lagda leistinum í skrivi, dagf. 30. januar 2007, sum við nærri útgreiningum verður lagt fyri aftur komandi umfar.

Mælt verður til at geva heimild til hølispartin beinanvegin.

Býráðsins samtykt:
Samtykt at taka í prinsippinum undir við ætlanini og at biðja umsitingina fyrireika málið at leggja fyri aftur. Rani Nolsøe luttók ikki í viðgerðini av hesum máli, vegna ógegni.

4.
Broyting av byggisamtykt – byggingarhædd og fráleikar.
Í samband við bygging av garagu niðanfyri veg renna vit okkum ofta í trupuleikan við byggingarhæddini, tí lendið sum oftast er sera bratt, og tað letur seg sum oftast ikki gera at byggja garagu eftir verandi ásetingum.

Hetta hevur fört við sær, at nógv frávik eru givin fyri slíka bygging. Sí skriv og frágreiðing frá T.U., har mælt verður til at broyta orðingina í 28. gr. – byggingarhædd og fráleikar. Endurskoðanarbólkurin er samdur um broytingina. Mælt verður til, at byggimál verða viðgjørd eftir hesi broyting uttan at senda málini til hoyringar, tí talan er um smærri frávik.

Tekniska nevnd viðgjørdi skriv frá T.U., dagf. 08.01.07 og mælir býráðnum til at taka undir við hesum skrivi.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

5.
Broyting av ásetingum í byggisamtykt viðv. "Brunaverju og Brunatrygd".
Í samband við endurskoðanararbeiði av byggisamtyktini so vil T.U. mæla til at broyta ásetingarnar í byggisamtyktini um brunaviðurskiftini soleiðis, at bert tann alment galdandi Kunngerð um brunaverju og brunatrygd verður galdandi framyvir.

Endurskoðanarbólkurin er samdur um broytingina. Mælt verður til, at byggimál verða viðgjørd eftir hesi broyting uttan at senda málini til hoyringar, tí talan er um smærri frávik.

Tekniska nevnd viðgjørdi skriv frá T.U., dagf. 08.01.07 og mælir býráðnum til at taka undir við hesum skrivi.

Býráðsins samtykt.
Tilmælið samtykt.

6.
2006-01-034 Skúlastýrið fyri Mikladals skúla – varalimur.
Vísandi til skriv 08.01.07 frá Anju Eliasen og samskifti við hana er nógv sum týðir uppá, at stýrið ikki virkar sum ætlað. Men tað er rætt, sum víst verður á, at eingin varastýrislimur er valdur fyri umboð kommununnar í stýrinum. Tá hesin limur er burtur stóran part av árinum vegna arbeiði, so er tað sera óheppi ikki at hava eitt varalim. Mælt verður tí til, at Mentunarnevndin skjýtur upp evni til varalim vegna kommununa í stýrið. Sí skriv frá umsitingini, 12.01.07.

Mentunarnevndin verður at kanna, hvussu málið eigur at fara fram – stýrislim og varalim. Annars verður mælt til, at Anja Eliasen verður vald sum varalim í skúlastýrið, um hon tekur við vali.

Býráðsins samtykt:
Uppskot frá Jákupi Mikkelsen, um at beina málið aftur í nevnd, fall við 4 atkvøðum fyri (Jákup Mikkelsen, Steinbjørn O. Jacobsen, Atli S. Justinussen og Kristian F. Olsen) og 6 ímóti (Kristian Eli Zachariassen, Rani Nolsøe, Torleif Sigurðsson, Eyðgunn Samuelsen, Gunvá við Keldu og Jórun Høgnesen). Hans A. Bertholdsen atkvøddi ikki.

Tilmælið frá borgarstjóranum, um at beina málið aftur í nevnd til nærri kanningar, fall við 5 atkvøðum fyri (Steinbjørn O. Jacobsen, Jákup Mikkelsen, Atli S. Justinussen, Kristian F. Olsen og Gunvá við Keldu) og 5 ímóti (Kristian Eli Zachariasen, Rani Nolsøe, Jórun Høgnesen, Torleif Sigurðsson og Eyðgunn Samuelsen). Hans A. Bertholdsen atkvøddi ikki.

Broytingaruppskot frá Jákupi Mikkelsen, um ikki at velja nakran tiltakslim, vísandi til fólkaskúlalógina, fall við 4 atkvøðum fyri (Jákup Mikkelsen, Steinbjørn O. Jacobsen, Kristian F. Olsen, og Atli S. Justinussen) og 6 ímóti (Rani Nolsøe, Kristian Eli Zachariassen, Torleif Sigurðsson , Jákup Mikkelsen, Gunvá við Keldu og Eyðgunn Samuelsen). Hans A. Bertholdsen atkvøddi ikki.

Atkvøtt varð síðan við navnakalli um innkomnu uppskotini, sum vóru 2 í tali: Anja Eliasen og Herfrí Sørensen. Anja Eliasen fekk 7 atkvøður (Kristian Eli Zachariasen, Rani Nolsøe, Torleif Sigurðsson, Eyðgunn Samuelsen, Gunvá við Keldu, Jórun Høgnesen og Steinbjørn O. Jacobsen). Herfrí Sørensen fekk 3 atkvøður (Jákup Mikkelsen, Atli S. Justinussen og Kristan F. Olsen). Hans A. Bertholdsen atkvøddi ikki.

Sostatt er Anja Eliasen vald.

7.
Viðv. um- og afturatbygging av skúlanum við Ósánna.
Víst verður til tilmæli 05.12.06 frá umsitingini, mentanarnevndarviðtøku 06.12.06 og Fíggjarnevndarviðtøku 13.12.06 og annars viðgerðir í byggibólkinum av hesum máli. Sí skriv frá umsitingini og kostnaðaryvirlit frá Sven Sivertsen.

Tekniska nevnd hevur havt málið til kunningar.

Svend Sivertsen kunnaði mentanarnevndina á fundinum um tekningarnar.

Nevndin tekur skrivi frá umsitingini, 15.01.07 til eftirtektar og mælir til, at kr. 2,9 mill. meir verða settar av til verkætlanina.
Fíggjarnevndin mælir til fund millum avvarandi partar í málinum áðrenn býráðsfundin.

Býraðsins samtykt:
Samtykt at taka undir við tilmælinum frá MeN. Tó verður vent aftur til spurningin um meiravsetingina.

Fundur lokin.